## Ravfør í Klaksvík

Í dag kl 13.30 verða tveir av elbilunum hjá SEV sýndir fram í túninum uttan fyri Bakaríið hjá Jórun í Klingrugarði í Klaksvík. Hetta er liður í framsýningarátakinum hjá SEV at slóa gøtuna fyri elbilum ella ravførum í Føroyum. Steinbjørn Jacobsen, nevndarlimur í SEV, kemur at hava bilarnar um hendi í eina viku í Norðoyggjum. Tá bilarnar hava verið í Norðoyggjum fara teir til Skálafjarðarøkið.



## Bilaframleiðarar fegnast

Tað er ikki bara í Føroyum, at bilasølan nú kvinkar uppeftir. Europiski felagsskapurin fyri bilaframleiðarar sigur, at januar mánaður í ár hevur víst eina stóra framgongd í søluni av nýggjum bilum. Ikki minst er tað sonevnda skrottgjaldið, sum bretar og italiumenn hava ásett, sum ger góðan mun. Framgongdin í hesum báðum londunum hevur verið um 30% í januar mánaði í ár. Fyri samlaða europiska marknaðin hevur framgongdin í januar mánaði verið 17,3%.

# Jón Brian Hvidtfeldt endaliga uppsagdur

**Jón Brian Hvidtfeldt er nú fyrrverandi tíðandaleiðari í Kringvarpi Føroya. Hann hevur nú fingið endaligu uppsøgnina frá Anniku Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóra**

KRINGVARPIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Eg havi fingið at vita, at kringvarpsstjórin endaliga hevur staðfest ætlanarskrivið um mína uppsøgn, og eg eri eisini biðin um at lata lyklarnar til Kringvarpið frá mær.

Hetta sigur Jón Brian Hvidtfeldt, sum millum jólanna fekk handað ætlanarskriv um uppsøgn sum tíðindaleiðari í Kringvarpi Føroya.

Hóast hann endaliga er uppsagdur sum tíðindaleiðari, so stendur honum framvegis í boði at gerast vanligur tíðindamaður í Kringvarpinum. Hetta tilboðið stendur við til 30. apríl, hevur hann fingið at vita.

- Eg havi ikki tikið støðu til hetta. Og eg havi heldur ikki tikið støðu til, hvat eg víðari fari at gera, sigur Jón Brian Hvidtfeldt, sum er týðuliga keddur av støðuni, hann er komin í.

Hann bað um fund við kringvarpsleiðsluna saman við advokati sínum fyri at royna at finna ein útveg. Hesin fundur var fríggjadagin, men har kom einki burturúr, sum kundi hjálpa hansara støðu.



*Jón Brian Hvidtfeld varð í gjár endaliga sagdur úr starvi sum tíðindaleiðari í Kringvarpi Føroya. Hann fer beinanvegin at kæra avgerðina til Mentamálaráðið - men honum stendur framvegis í boðið at gerast vanligur tíðindamaður í Kringvarpinum*

- Tí bóðu vit Anniku Mittún Jacobsen koma við eini avgerð, so vit kundu kæra avgerðina beinavnvegin til Mentamálaráðið, sigur Jón Brian Hvidtfeldt.

Jón Brian Hvidtfeldt hevur ikki verið til arbeiðs í Kringvarpinum seinastu tíðina. Fyrstu dagarnar var hann eitt sindur til arbeiðis, men tá hann fekk boð um, at hann skuldi ganga vanliga tíðindavakt, um hann skuldi vera til arbeiðis, fór hann til hús.

Starvsfólkini á tíðindadeildini í Kringvarpinum vórðu kallað til fundar klokkan 13:15 seinnapartin, har kringvarpsstjórin kunnaði um uppsøgnina. Jón Brian Hvidtfeldt slapp ikki við á fundin.

Jón Brian Hvidtfeldt hevur fýra vikur til at taka støðu til, um hann skal kæra uppsøgnina - og honum stendur í boði fram til 30. apríl at gerast vanligur tíðindamaður í Kringvarpi Føroya.

## Vónin við í stórari verkætlan í Kanada

**Saman við Marine Institute í Nýfundlandi skal trolvirkið Vónin arbeiða við einari sera umfatandi verkætlan, sum skal minka um ávirkanina, sum botntrol hava á botnin. Samlaði kostnaðurin á verkætlanini er mettur at verða 22 milliónir krónur**

VINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hendan verkætlanin hevur vakt stóran ans í Kanada, og hevur Atlantic Innovation Fund (AIF), sum er ein grunnur hjá tí kanadiska statinum, valt at stuðlað hesari verkætlan við nærum 10 milliónum krónum. Stuðulin frá AIF var almannakunngjørdur av kanadiska verjumálaráðharranum, Peter Mackay, á einum tíðindafundi á Marine Institute 31. januar. Umboð fyri Vónina vóru eisini til staðar á tíðindafundinum.

Málið við verkætlanini er at menna botntrol, sum skulu hava minni ávirkan á botnin, men framvegis fiska væl. Úrslitið verður nýggj útgerð, sum verður meira umhvørvisvinarlig.

Tey komandi árini verður tað væntandi eitt krav frá nógvum av heimsins londum at umhvørvisvinarlig botntrol verða nýtt. Við at vera við í hesari verkætlan væntar Vónin at kunna menna botntrol, sum koma at liva upp til hesi krøv.

- Í staðin fyri bara at standa á síðulinjuni og bíða til hesi krøv koma yvir okkum, so hava vit valt at tikið av møguleikanum at vera við í hesari stóru verkætlan, tí vit hava ábyrgd sum trolvirki at finna nýggjar og betri loysnir, sigur Hjalmar Petersen stjóri á Vónini.

Bólkurin, sum kemur at taka sær av verkætlanini, er settur saman av verkfrøðingum, havfrøðingum, fiskiskiparum og umboðum frá Vónini, sum koma við síni vitan um trolreiðskap.

Ætlanin er at verkætlanin fer í gongd í apríl 2010, og at hon skal verða liðug í mars í 2015. Tá verkætlanin er liðug, hevur Vónin einarætt at brúka úrslitini vinnuliga.

Vónin er saman við norska RFG partur av VON samtakinum, og saman hava feløgini 17 deildir í Føroyum, Grønlandi, Kanada og Norra. Tað starvast dagliga umleið 200 fólk hjá VON samtakinum.

# Tromsø vil hava fleiri fiskivinnuskúlanæmingar

**Jóan Karl Joensen, sum lesur fiskarífak á lærdum háskúla í Tromsø, kemur í næstum til Føroya at kunna um útbúgvingarmøguleikar í norðurnorska býnum**

ÚTBÚGVING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Mikil orrusta var í miðlunum um Jóan Karl Joensen í summar, tá hann ikki slapp inn á lærdan háskúla í Noreg við prógvi frá Fiskivinnuskúlanum. Alt kom tó í rættlag, og nú kemur hann til Føroya at kunna um útbúgvingarmøguleikar í Noreg*

Prógvið frá Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna man hava roynst væl í norðurnorska býnum Tromsø, tí í næstum kemur Jóan Karl Joensen, sum lesur fiskarífak við norska universitetið til Føroya at kunna um útbúgvingarmøguleikarnar á norðurnorska universitetinum. Tey flestu munnu minnast Jóan Karl, sum var nógv frammi í fjølmiðlunum síðsta summar, tí norðmenn settu spurnartekin við prógvið frá Fiskivinnuskúlanum. Men nú er vent í holuni.

Jóan Karl byrjaði lesturin í Tromsø síðsta summar, og herfyri heitti lærustovnurin á hann um at fara til Føroya at fáa fleiri fiskivinnunæmingar og aðrar føroyskar miðnámsnæmingar at koma til Noregs at útbúgva seg. Jóan Karl kemur til Føroya beint áðrenn ella beint eftir páskir, og tá fer hann at ferðast runt og kunna á fleiri føroyskum miðnámsskúlum.

Fyrrverandi næmingurin frá Fiskivinnuskúlanum sigur seg trívast væl í Tromsø, men hann gleðir seg til at sleppa ein túr til Føroya á páskum, har hann sjálvsagt eisini fer at heilsa upp á vinir og kenningar.

- Vit á Fiskivinnuskúlanum gleða okkum til at fáa vitjan av Jóan Karl. So verður tað spennandi at síggja, um hann klárar at sannføra fleiri fiskivinnunæmingar um, at tað er eitt gott hugskot at fara til Norðurnorra at lesa víðari, sigur Jákup Andreassen, stjóri á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.